gult cyan magenta svart

DAGSINS MEINING

Eitt álvarsligt mál

Ein samrø›a í bla›num mundi enda› vi›, at landsst‡risma›urin í mentamálum fekk sekkin. Or›ini hjá Torbirni Jacobsen í bla›samrø›uni vóru hør›, kontant og ógvuslig, júst solei›is sum vit eisini kenna politikaran Torbjørn Jacobsen. Hóast hann sersliga fór yvir um linjuna vi› einstøkum úttalilsi um løgmann, so var alt hann seg›i nøkur samanhangandi sjónarmi› og uppger› vi› ta›, sum løgma›ur hev›i úttala›. Samrø›an var tí at meta sum ein heild, i› greitt og rætt endurgav ta›, i› landsst‡risma›urin meinti.

Eftir eina roynd frá Tjó›veldisflokkinum at fáa broytt samrø›una ella ste›ga› henni gjørdist greitt, at hetta bar ikki til. Bla›i› hev›i heldur onga orsøk til at seta spurnartekin vi› ta›, sum landsst‡risma›urin bar fram, um ta› nú var bor›bart ella ikki. Hann er vanur at úttala seg til pressuna og hevur fingi› mest sum øll síni mál vi›gjørd í bla›num umframt at rø›ur hansara hava veri› á prenti. Hví skal bla›i› so ikki taka ta› fyri gó›a vøru, tá hann ger vi›merkingar til eitt mál, sum hann eisini er upphav til og so engagera›ur í! Uppgáva okkara er ikki at vera eitt slag av ansingareftirliti vi› tí, sum landsins hægstu menn og kvinnur bera fram í einum heitum politiskum or›askifti. At landsst‡risma›urin sær tjøll á aljósum degi og tvíheldur um, at løgma›ur vi› sínum úttalilsum ber seg at sum danskur leigusveinur, eru hansara or›, ósensurera› av okkum. Tey má hann vera ma›ur fyri at standa aftanfyri og taka avlei›ingarnar av. Solei›is má skipanin virka.

Tá hann fer út og leggur Sosialin undir at hava manipulera› vi› sínum úttalilsum og leggur bla›i› undir at hava lagt sær or›ini í munnin og harvi› vísir aftur, at hann skal hava úttala› naka› slíkt til bla›i›, er greitt, at hann harvi› leggur sama bla›, i› altí› hevur givi› honum innivist fyri sínum meiningum, undir at lúgva. Tá bla›i› ger vart vi›, at landsst‡risma›urin vitandi sigur ósætt, tí vit hava úttalilsini á bandi, tekur Sjónvarpi› søguna upp, i› ta› eisini eigur. SvF ger ta› einasta rætta og bi›jur Sosialin um at fáa bandi›. Her var talan um so serstakar umstø›ur, at bla›i› metti ta› vera rætt/ney›ugt at lata SvF bandi›. Tí var› bandi› ikki spælt av, hev›i Sosialurin sta›i› eftir sum lygnarin og manipulatørurin. Tí var ta› rætt at lata SvF bandi›. Ta› er av t‡dningi fyri eftirtí›ina, at politikarar kenna sínar egnu avmarkingar og avlei›ingarnar fara teir ov langt. Ta› er teirra uppgáva at kenna hetta marki›. Leggja mi›larnir seg út í ta›, so eru teir partur av tí politiska spælinum. Ta› stendur tí fast, at endurgav SvF ikki bandi›, stó› bla›i› eftir sum lygnarin og tann, sum hev›i manipulera› vi› or›unum hjá landsst‡rismanninum. Og hann hev›i kunna› vaska› hendur sínar sum einki var hent. Tá stó› hann kanska entá eftir sum tann forfylgdi. Men so væl spældi klaveri› ikki. Til alla lukku fyri øll.

Sosialurin

NØVN Í VIKUNI

Sum fa›ir so sonur…

Jan Christiansen tekur vi› sum borgarstjóri í Tórshavnar kommunu 1. januar ár 2001. Hetta var› greitt fríggjadagin, tá Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin almannakunngjørdu, at teir gingu saman í samgongu.

Borgarliga samgongan var eisini væntandi, tí flokkarnir fingu tilsamans átta av trettan b‡rá›slimum.

Hóast einans 42 ára gamal hevur Jan drúgvar royndir í b‡rá›sarbei›i. Hann var› fystu fer› valdur í b‡rá›i› sum 26 ára gamal í 1984 - og har hevur hann siti› sí›ani. Pápi hansara, Petur Christiansen úr Havn, ella Petur C, sum hann vanliga ver›ur nevndur, umbo›a›i eisini Fólkaflokkin í b‡rá›num í mong ár. Hann var borgarstjóri skei›ini bæ›i frá 1972-80.

Mó›irin er Anna, f. Poulsen at Strondum. Hon er dóttir gitna tingmannin, Jóhan Poulsen, sum umbo›a›i Sambandsflokkin á tingi í ikki færri enn 50 ár, frá 1920 til 1970 uttan slit, so politisku genini hevur Jan. Pápi hansara, Petur C, umbo›i eisini Fólkaflokkin í løgtinginum frá 1966-70.

Ein av andstø›umonnunum í b‡rá›num gav Jan ta› sko›smál, at hann var »ein fittur f‡rur«. Hann dugir væl at práta, og er altí› fryntligur. Bla›menn kunnu í øllum førum sta›festa, at hann hevur sett sín dám á b‡rá›sfundirnar, vi› sínum bragdliga sinni.

Jan er útbúgvin lærari frá Føroya Læraraskúla í 1982, og hann hevur veri› lærari á Skúlanum á Trø›ni sí›ani. Á›renn hann fór á læraraskúla í 1978 starva›ist hann sum vikarur í Sankta Frans skúla skúlaári› 1977-78.

Jan er giftur Elsu Mariu Bærentsen í Havn. Hann hevur sí›ani læraraskúlan nomi› sær kunnleika innan spesialpedagogikk og loki› prógv sum talu- og hoyrilærari.

At n‡ggi borgarstjórin í Havn er arbei›ssamur sæst eisini aftur í, at hann dúgliga hevur hjálp farbró›rinum, Haldori Christiansen í handlinum í Bringsnargøtu, i› ber navni› eftir ommu Jan, Katrinu Christiansen. Hetta er einasti gamli handilin, sum eftir er í Havnini, har keypt ver›ur um skivuna.

Sum borgarstjóri hevur Jan valla stundir til Handlin, men hann kann hava sína ávirkan á, at slíkir handlar ikki hvørva úr Havnarmyndini, tí ta› er nógv fari›.

Steinbjørn n‡ggjur borgarstjóri

Gongur alt sum ætla›, ver›ur Steinbjørn Jacobsen n‡ggjur borgarstjóri í Klaksvík eftir árskifti›.

Fríggjakvøldi› gjørdu Tjó›veldisflokkurin, Javna›arflokkurin og Sjálvst‡risflokkurin samgongu, og eftir drúgt strí› um, hvør skuldi hava borgarstjóran, samdust partarnir um, at ta› skuldi Tjó›veldisflokkurin, sum er størsti flokkurin í samstarvinum.

Eingin ivi var tá um, hvør av b‡rá›slimunum hjá Tjó›veldisflokkinum skuldi hava starvi›, tí av tjó›veldisfólkunum fekk Steinbjørn Jacobsen nógv flestar atkvø›ur á b‡rá›svalinum hesafer›. Hann fekk 230 persónligar atkvø›ur, og ta› var næstan tríggjar fer›ir so nógvar atkvø›ur sum á valinum í 1996. Hann fekk næstan hundra› atkvø›ur fleiri enn næsti ma›ur á listanum.

Steinbjørn Jacobsen er útbúgvin múrari, og hann hevur havt sítt egna virki, men sí›ani mi›skei›is í áttatiárunum hevur hann starvast hjá Húsalánsgrunninum.

Steinbjørn hevur eisini fingist nógv vi› sang. Hann sang vi› í Kvartettini í Betesda, sum gav plátu út í sjeytiárunum, og hann hevur eisini sungi› í kórinum í Betesda.

Steinbjørn er fyrikomandi og fryntligur ma›ur, og hann er eisini sera ítróttaráhuga›ur. Hann er pápi landsli›sspælaran Rógva Jacobsen, og tí er ta› ikki minst fótbólturin, sum hevur stóran áhuga hjá honum.

Steinbjørn er giftur og eigur f‡ra synir og eina dóttir.

†

Kunngjørt ver›ur at gó›a mamma, vermamma, omma og langomma okkara

Soffy Mikkelsen
Hoyvík

anda›ist á Landssjúkrahúsinum leygardagin 25. nov. 2000, 85 ára gomul.
Fari› ver›ur úr Landssjúkrahúskapellinum t‡sdagin 28. nov. kl. 18.
Jar›arfer›in ver›ur úr Havnar kirkju mikudagin 29. nov. kl. 13.

Fyri tey avvar›andi
Emmely og Carl

Sosialurin

Sosialurin
Stovna›ur: 1927
Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Bla›stjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tí›indalei›ari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Markna›ardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

Bla›fólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Ey›un Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turi› Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Sveinur Tróndarson sveinur@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmi›stø›in

Avgrei›sla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Bla›i› ver›ur prenta› mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

L‡singar

Freistir:	Tekstl‡singar	Størri l‡singar	L‡singartorgi›	Heilsanir
T‡sdagsbla›i›	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsbla›i›	T‡s. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsbla›i›	Mik. kl. 10	T‡s. kl. 15	T‡s. kl. 12	T‡s. kl. 12
Fríggjadagsbla›i›	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsbla›i›	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri l‡singar, sum nógv arbei›i stendst av, mugu vera inni í gó›ari tí› og á›renn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbi›jast í gó›ari tí›.

Stødd:
Ein heil sí›a í Sosialinum er 254mm brei› og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmi› millum teigarnar er 4mm.